Skála-KÍ 6-1 (1-0):

Skála sannførandi silvurvinnarar

Í góðveðrinum leygardagin vestaru megin á Skálafjørðinum vóru møguleikar fyri fleiri enn tíggju málum

2. DEILD
Jóannes Hansen

Skálamenn gjørdu sítt. Teir vunnu 6–1 á KÍ í tí, sum sambært kappingarskipanini var síðsta umfarið í næstbestu deildini.

Men bæði skálamenn og klaksvíkingar vistu, tá teir fóru undir brúsuna, at búnarnir skulu brúkast í hvussu so er tvær ferðir afturat. Tað er møguleiki fyri, at bæði feløgini halda fram í 2. deild, men tað er eisini møguleiki fyri, at Skála verður í 1. deild, og at KÍ verður í 3. deild, har skálamenn vóru í fjør. Tá endaspælið um uppflyting og niðurflyting verður liðugt um tvær ella tríggjar vikur, verður greitt, hvussu tað verður við hesum.

KÍ skal spæla tveir dystin ímóti Royn, sum endaði næstfremst í 3. deild. Enn er ógreitt, hvørjum Skála skal spæla ímóti.

Lítil munur

Heimaliðið var betri fyri, enn gestirnir úr Klaksvík vóru. Men tað var ikki fyrrenn í 2. hálvleiki, at tað gjørdist alt meiri týðuligt, at venjingarstøðan hjá ungu monnunum var væl betur, enn hon var hjá KÍ, har teir flestu áður hava verið væl trimmaðir í bestu deildini.

Skála kom á odda, tá eitt korter var farið. Alexander Johansen fekk fulla úrtøku úr ellivu metrum. Støðan, sum dómarin metti til brotsspark, hevði einki sum helst við brotsspark at gera. Bæði áskoðararnir og spælararnir á heimaliðnum tóktust skakkir, tá brýkslað varð fyri brotssparki. Álopsmaðurin hevði sneitt framvið einum av verjuspælarunum, tá hann rendi seg í krovið á einum kropssterkum verjuspælara, sum í sovornari støðu sjálvandi ikki við vilja fór at flyta seg.

Gestirnir vórðu eitt sindur royttir, og kanska var hetta orsøkin, at tað ikki var frítt, at teir spruttaðu síðsta hálva tíman av fyrra umfarinum. John Ryan hevur verið betri fyri, enn hann er nú, men evnini at spæla bólt eru framvegis góð, og tá Finn Baldvinsson, Eyðun Klakstein, Erling Fles og Leon Bjartalíð allir vóru við upp á tað, og Torleif Eyðun Petersen, Poul Juul Vilhelmsen og Sámal Eyðfinn Akursmørk hesa løtuna høvdu hampuligt tak á frammanfyri veteranin John William Joensen, so var munurin í spælbýti ikki so stórur, at tað sást, at annað liðið kanska er á veg í 1. og hitt í 3. deild.

Stórur munur

Skála økti beinanvegin eftir steðgin. Dómarin helt, at KÍ málverjin hevði hildið bóltinum uttanfyri brotsteigarmarkið, tá hann skuldi spæla frá sær. Tað vóru málverjin og klaksvíkingarnir ikki samdir við svartklædda manninum í. Skálamenninir vóru púra kaldir, og Bogi Gregersen sendi flatt ígjøgnum manngarðin og í netið.

So var tað, at munurin í orkuni gjørdist alt meiri sjónskur. KÍ spælararnir gjørdu nógv mistøk, og í sovornari støðu fór Alexander Johansen ígjøgnum í vinstru, legði flatt innfyri til Boga Gregersen, sum var púra leysur.

3–0 og alt var avgjørt. Tí var tað púra óskiljandi, at ein av ungu klaksvíkingunumm skuldi hevna seg, so tað var neyðugt hjá dómaranum at fara í lumman eftir skorpuni.

Stutt eftir økti Kaysten Rasmussen eftir uppspæl í vinstru til 4–0. Spurningurin var so, hvussu nógv yvirmannaða heimaliðið skuldi vinna. Teir høvdu eina rød av møguleikum, m. a. tá rangstøðufellan hjá KÍ miseydnaðist. Men KÍ skoraði eitt mál, áðrenn Skála fekk tvey tey seinastu. Olgar Danielsen varð skrásettur fyri málið eftir horna úr høgru. KÍ veteranurin, sum sleit sínar fyrstu barnaskógvar á Gjarðanesi, tóktist stýra bóltinum í málið við hondini.

Alexander Johansen økti til 5–1, og tað var um reppið, at hann gjørdist trímálsskjútti, men beinini vórðu tikin undan honum, júst tá hann úr púra leysari støðu skuldi royna seg. Innskifti Jóhannes Mikkelsen staðfesti sigurin í tennistølum.

Skála-KÍ 6-1 (1-0)

1-0: Alexandur Johansen
2-0: Bogi Gregersen
3-0: Bogi Gregersen
4-0: Kaysten Rasmussen
4-1: Olgar Danielsen
5-1: Alexandur Johansen
6-1: Jóhannes Mikkelsen

Fagnaðurin var somikið stórur, at visti tú ikki betri, kundi Skála havt tryggjað sær beinleðis uppflytan til bestu deildina
Mynd: Eyðun Klakstein

FCK dúvar nú upp á verjuna

Teir í felagnum hjá Toda Jónsson vóru fegnir um at sleppa úr Aalborg við einum stigi

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Eingin føroyingur var á vøllinum, tá níggjunda umfarið í bestu dansku fótbóltsdeildini sunnudagin var á skránni.

FCK var í Aalborg. 8.574 áskoðarar møttu upp, og teir vístu stórsinni, tá teir fagnaðu nýggja FCK venjaranum, Hans Backe, sum í níti árunum vandi AaB í tvey og eitt hálvt ár. Tað hilnaðist væl, og fagnaðurin í Aalborg sunnudagin bar boð um, at har hava tey ikki gloymt DM heitið í 1999.

Merkisvert var tað, at fýra av fyrstu álopsmonnunum hjá FCK vóru skaddir. Umframt Toda Jónsson var talan um Heine Fernandez, Zuma og Pascal Simpson.

Nýggi FCK venjarin hevur undirstrikað, at tað ræður um at skipa verjupartin. Teir siga, at FCK hevur spolað aftur, so støðan nú er, sum hon var, tá Roy Hodgson kom til felagið.

AaB kom á odda við tunnum brotssparki í 28. minutti, og Thomas Røll javnaði tveir minuttir undan steðginum.

Í 2. hálvleiki vóru nógvar spentar støður, men málverjarnir báðir, Jimmy Nielsen hjá AaB, og Magnus Kihlstedt í FCK málinum, stóðu seg væl. Ikki minst hjá svianum í FCK málinum mundi hetta kennast hugaligt. FCK viðhaldsfólkini hava í fleiri vikur tosað um, at tað hevði vitað betri við, um ungi Rune Pedersen aftur hevði fingið møguleikan ímillum stólparnar.

Troyttir á oddaliðnum

Í Brøndby er áhugin fyri fótbólti sera stórur. 11.875 sóu dystin ímóti Viborg. Talan var um ikki serliga undirhaldandi dyst. Ferðin var lá, og intensiteturin var lítil. Tað var týðuligt, at teir í Brøndby vóru troyttir, eftir at teir næstsíðsta sunnudag høvdu spælt rimmardyst ímóti FCK og hóskvøldið høvdu vunnið í UEFA Cup á útivølli. Og tá so teir í Viborg vóru meiri enn væl nøgdir við at fáa eitt stig, var tað ikki óvæntað, at einki mál kom.

Í Lyngby vóru tvey lið í kreppu ikki misnøgd við at fáa eitt stig í part. Í 1. hálvleiki kom púrt einki burturúr, men í regninum í 2. hálvleiki skoraði OB tvey mál upp á langskot, og Lyngby fekk tvey mál eftir kiks í OB verjuni. Johan B. Hansen var einki at síggja til í OB verjuni.

Silkeborg er í svárari kreppu. Hesa ferð taptu teir 1–0 á heimavølli ímóti FCM, og nú verður tað hildið ikki at vera so langt burtur, at Benny Johansen, sum áður hevur verið venjari hjá FCK, fer at fáa sekkin, sjálvt um eingin ivast í, at tað er sølan av fleiri lyklaspælarum, og tað at fleiri eru givnir at spæla, sum eru orsøkirnar til soltnu úrtøkuna. Millum stuðulsspælararnar, sum ikki eru við longur, eru Thomas Røll, sum er í FCK, Henrik Petersen, sum er farin til Bolton, og Morten Bruun, sum er givin.

Í Vejle var tað sera undirhaldandi. Heimaliðið kom á odda í 7. minutti, og teir høvdu nógvar møguleikar fyri fleiri málum, men tað endaði kortini við javnleiki. AB javnaði seks minuttir eftir steðgin.

Í gjárkvøldið skuldi Esbjerg fáa vitjan av AGF. Sambært upptaktunum í donskum fjølmiðlum, so skuldi Christian Høgni Jacobsen ikki vera í Esbjerg hópinum.

Heðin fjøruti mál í bestu deildini

Málið, sum bar FM heitið við sær, var kanska eitt tað besta og í hvussu so er tað minnisríkasta hjá Heðini á Lakjuni

MATCVINNARIN
Jóannes Hansen

á Lakjuni er eitt av mest kendu eftirnøvnunum í føroyskum fótbólti í níti árunum. Eldru brøðurnir hjá Heðini á Lakjuni, Jákup Oluf og Jógvan, vóru uppløgd evni til besta KÍ liðið, áðrenn teir gjørdust skipsmenn, og yngri beiggin, Kristian, vísti í fjør fín evni á besta KÍ liðnum.

Leygardagin skoraðu tvey systkinabørn, tá ÍF vann 2–0 í Runavík, og millum liðfelagarnar hjá Heðini var systkinabarnið Magni á Lakjuni.

40 mál

Heðin á Lakjuni hevur verið millum mest eyðsýndu fótbóltsspælararnar í Føroyum seinnapartin av níti árunum.

Hann kom á besta KÍ liðið í 1995. Tá skoraði hann trý mál. Tað fyrsta skoraði hann í tólvta umfarinum. Talan var um sigursmálið í 4–3 heimasigrinum ímóti B68. Í 1996 skoraði Heðin á Lakjuni tvey mál, í 1997 níggju mál, og í 1998 skoraði nýggi FM vinnarin fýra mál.

Tá Heðin á Lakjuni í 1999 fyri fyrstu ferð vann FM, hjálpti hann til m. a. við at skora seks mál, og í fjør vísti kontoin sjey mál.

Heðin á Lakjuni hevur skorað tólv mál í ár. Tað er hægsta talið, sum hann higartil hevur skorað í landskappingini. Samlaða talið er 40, og so skulu vit leggja øll málini, sum Heðin hevur skorað í steypakappingini.

Men eingin ivi man vera um, at 1–0 málið í avgerandi dystinum um FM heitið í 2001 fer altíð at standa ógvuliga frammarlaga í fótbóltshuganum hjá Heðini á Lakjuni, sum komandi leygardag hevur møguleika at koma uppaftur longri upp á skjúttaralistanum. Heðin er sera væl fyri, og tí er góður møguleiki fyri, at hann bæði fer at skora eina og tvær ferðir í Vági.

Fann ikki orð

Heðin á Lakjuni gjørdist dagsins maður í B36-húsinum, og sjálvandi frøddist hann um hetta eftir dystin

FÓTBÓLTSTOS
Jákup Mørk

Tað var ein ovurfegin málskjútti, sum ikki kundi seta orð á kenslurnar sum vit hittu sunnudagin.

– Hatta var heilt ótrúliga deiligt. At sleppa at skora í einum slíkum dysti, og avgera dystin til okkara fyrimun. Eg dugi ikki at siga, hvussu tað kendst, helt hann.

Eftir málið fullu teir hvítu nakað langt aftur á vøllin, men Heðin helt ikki, at hetta var orsakað av, at teir vóru bangnir fyri at missa gullið.

– Tað er altíð soleiðis, at tú fellur longur aftur, tá tú hevur vunnið teg framum. Kanska áttu vit ikki at gjørt tað, men tað gekk so tíbetur, segði fegni greipuvinnarin eftir dystin.

Tað kann annars leggjast afturat, at hetta er seinna ferðin, at Heðin vinnur greipuna, men hóast kenslan soleiðis ikki var nýggj, so helt hann fyri, at stuttleikin var hin sami hvørja ferð.

Næsta steypið

John Petersen hevur ongan tíð roynt at veri liðskipari hjá einum FM-vinnara

FÓTBÓLTSTOS
Jákup Mørk

John Petersen hevur verið við til eitt sindur av hvørjum í føroyskum fótbólti.

Gullið hetta kappingarárið er hansara fimta í fyrstu deild, men í mun til hini, er hetta fyrsta ferðin, at hann er liðformaður hjá einum FM-vinnara.

Spurdur, um hetta kendist størri av hesum, segði John, at tað hevði als ikki hugsað um.

– Eg veit ikki, hvussu tað fer at verða. Eg havi verið eftir einum steypi fyrr í ár, og tað ger nokk einki, um mann so fer eftir tveimum, so tað gleði eg meg bara til, segði John.

– Eg havi verið eftir einum steypi fyrr í ár, og tað ger nokk einki, um mann so fer eftir tveimum, so tað gleði eg meg bara til, segði John
Mynd: Álvur Haraldsen

Seta metini

Annars hevði John sjálvur ein hin størsta møguleikan í dystinum, tá hann gjørdist púrasta leysur framman fyri HB-málinum tíðliga í fyrra hálvleiki. Um hesa hendingina segði John sjálvur, at hann sá ikki leikaran, sum stóð á strikuni.

– Hatta var ein stórur møguleiki. Bólturin kom so knappliga til mín, tá skotið frá Jákupi varð avrættað. Eg helt, at eg skuldi bara stýra bóltinum inn, men har var so ein maður, men tíbetur gjørdi tað einki, tá saman um kom.

Hóast teir longu eru meistarar, so hevur B36 framvegis ein dyst eftir at spæla, og tað eisini soleiðis, at leikararnir ætla sær at vinna hendan.

– Nú hava vit bara met at fara eftir, men tey ætla vit okkum eisini at taka, segði ein smílandi liðformaður at enda.

Nú er skjótari

B36 formaðurin tykist sannførdur um, at við nýggju øldini eru eisini nýggir tónar at hoyra í heimligu fótbóltskappingini

FÓTBÓLTSTOS
Jákup Mørk

Eftir regndystin móti KÍ á ólavsøku helt B36 formaðurin, Kristian á Neystabø, at sigurin hevði alstóran týdning fyri felagið. Sjálvsagt hevði sigurin sunnudagin enn størri týdning, og yvir høvur helt formaðurin, at B36 við hesum setti eina nýggja kós, nú farið er um aldarmarkið.

– Sigurin á ólavsøku var sjálvandi stórur. Tað var fyrstu ferð í 10 ár, at vit vunnu steypakappingina. Sigurin í dag hevði eisini ótrúliga stóran tydning. Hetta er fyrsta greipan, sum vit hava vunnið, og vit hava fyri fyrstu ferð síðani '68 vunnið báðar dystirnar á HB.

Nýggir siðir

Spurdur, um hetta er tekin um nakað nýtt, sigur formaðurin, at tað kann mann gott siga.

– Hagtølini móti grannunum eru í øllum førum góð í hesari øldini, og tað mugu so royna at halda í framtíðini.

At enda spurdu vit formannin, um hann torir at gita, hvussu leingi viðhaldsfólkini skulu bíða eftir næsta sigrinm. Hesa ferð bíðaðu tey í fýra ár, men flestu teirra munnu minnast oyðimarkargongdina frá 1962 til 1997, men formaðurin roknar ikki við, at hetta fer at henda aftur í bræði.

– Eg ksnn ikki lova, at tað verður longu komandi ár, men tað verður í øllum førum innan fýra ár, segði ein bæði fegin og bjartskygdur Kristian á Neystabø eftir dystin.

- Hetta er fyrsta greipan, sum vit hava vunnið, og vit hava fyri fyrstu ferð síðani '68 vunnið báðar dystirnasr á HB

Hart arbeiði

Tað er úrslitið av hørðu venjingini í vár, sum vit nú síggja, heldur Piotr Krakowski

FÓTBÓLTSTOS
Jákup Mørk

Tað var sjálvandi ein fegin Piotr Krakowski, sum Sosialurin fekk orðið á eftir sigurin á HB. Sigurin tryggjaði B36 fyrstu greipuna í søgu felagsins, og hesum náddi Piotr eftir bert einum ári við róðrið.

Spurdur, um nakað loyndarmál lá aftan fyri góðu úrslitini, sigur Piotr, at tað ger tað sum so ikki varð skapt í januar, februar, mars og apríl.

– Sjálvandi hevur dygdin á leikarunum eisini verið góð í ár, og saman við góðu venjingarstøðuna hevur hetta tryggjað okkum gullið.

– Eg veit undan hvørjum dysti, at mínir menn eru klárir, bæði kropsliga og sálarliga, og at teir tí fara á vøllin at gera eitt gott arbeiði.

– Eg havi síðani januar mánaða sagt við spælararnar, at vit skulu trúgva upp á tað. Teir hava arbeitt hart fyri hesum alla tíðina, og grundarlagið undir árinum

– Eg veit undan hvørjum dysti, at mínir menn eru klárir, bæði kropsliga og sálarliga, og at teir tí fara á vøllin at gera eitt gott arbeiði.
Mynd: Álvur Haraldsen

Høvdu møguleikan

At enda spurdu vit eisini Piotr, um tað var nakað serligt, sum hann segði leikarunum, áðrenn teir fóru á vøllin sunnudagin.

– Eg segði við teir, at í dag høvdu teir møguleikan. At B36 nú hevði fingið ein søguligan møguleika, og at hesin skuldi takast, tí vit vita ikki, nær hesin ella um hesin kemur aftur, segði pólverski venjarin hjá B36 at enda.